**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 137/2009**: **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Forskotsgrunn Fiskiflotans**

Tjóðveldi hevur lagt málið fram tann 6. mars 2010, og eftir 1. viðgerð 12. mars 2010 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 18. og 25. mars og 15., 26. og 29. apríl 2010.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, saman við nevndini í Forskotsgrunninum.

Frá formanninum í Forskotsgrunninum fekk nevndin avrit av tilsøgn frá Forskotsgrunninum til Fiskirannsóknarstovuna um 10 mió. til nýtt havrannsóknarskip, avrit av uppskoti til lógarbroyting, sum Forskotsgrunnurin hevur latið gjørt, umframt forskotsroknskap 2009 fyri Forskotsgrunnin.

Nevndin hevur í síni støðutakan býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Katrin Dahl Jakobsen, Bjørn Kalsø, Heðin Zachariasen, Bjarni Djurholm, Mikkjal Sørensen og Kári P. Højgaard) vísir á, at hóast fyriliggjandi broytingaruppskot gevur Forskotsgrunninum heimild at lata pening til nýtt havrannsóknarskip, so kann einki arbeiði setast í gongd, fyrr enn ein verklagslóg og neyðugar játtanar, ið heimila endaliga kostnaðin eru samtyktar. Eisini er greitt, at projekteringsarbeiðið í sær sjálvum bert gevur arbeiði í avmarkaðan mun. Ikki fyrr enn ein verklagslóg er fyrireikað og samtykt, kann væntast, at talan verður um arbeiðsskapandi átøk, ið muna. Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen) vísir á, at við hesi broyting fær Forskotsgrunnur Fiskiflotans materiella heimild til at lata landskassanum pening at nýta til nýtt havrannsóknarskip. Landsstýrismaðurin kann síðani koma við uppskoti um at inntøkuføra peningin á fíggjarlógini. Løgtingið fylgir við hesum viljanum hjá nevndini fyri grunnin, sum fegin vil lata yvirskotskapital úr grunninum til hetta samfelagsgagnliga endamál – sí viðmerkingarnar til uppskotið.

Hóast mong føgur orð hava verið søgd um viljan at fara undir nýtt Havrannsóknarskip, so varð henda íløga strikað av fíggjarlógini fyri inniverandi ár. Tjóðveldi hevur verið millum teirra, sum ferð eftir ferð hava víst á, hvussu stóran týdning tað hevur fyri eina fiskivinnutjóð, at hava eitt nútímans havrannsóknar skip. Fyri stovnsrøktina, fyri vinnuna, og ikki minst sum eitt kærkomið arbeiðsskapandi átak, ið kann tryggja nógv arbeiðspláss innan skipasmíð og avleiddar vinnur. Gleðiliga hava bæði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum og í vinnumálum eisini víst á, at hetta er

íløga, landsstýrið eigur at raðfesta. Við at taka undir við hesum uppskoti, fær Løgtingið høvi at tala og fáa staðfest, hvørt viljin stendur til at fara undir at smíða Havrannsóknarskipið sum skjótast.

Minnilutin tekur tí undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 29. apríl 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Katrin Dahl Jakobsen<br>formaður | Bjørn Kalsø<br>næstformaður | Heðin Zachariasen |
| Bjarni Djurholm | Mikkjal Sørensen | Bjørt Samuelsen |
| | Kári P. Højgaard | |